

# Kundi tú hugsað tær at arbeitt við ungdómi?

## – so hava vit eitt avbjóðandi starv til tín

KFUM og KFUK søkja medarbeiðara, sum hevur hug at arbeiða millum ungdóm í einum fjølbroyttum kristiligum umhvørvi.

**Arbeiðið umfatar**
- leggja ungdómsarbeiðið til rættis
- skipa fyri tiltøkum fyri børn og ung
- røkja dagliga arbeiðið á skrivstovuni

**Vit vænta**
- tú ert álítandi og trúgvandi
- tú dugir at arbeiða við børnum og ungum
- tú kennir til sjálvboðið kristiligt arbeiði
- tú kanst samstarva við onnur
- tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur áræði at taka nýggjar tættir upp

**Vit bjóða**
- eitt avbjóðandi og spennandi starv
- fjølbroyttar og mennandi uppgávur
- góð arbeiðsviðurskifti og góða løn

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til KFUM og KFUK á tel 31 19 28 ella fartelefon 21 18 24.

**Umsókn og freist**
Skrivlig umsókn við ummælum og skjølum skal vera okkum í hendi innan 4. juni 2007.

KFUM og KFUK í Havn eru tveir savnandi ungdómsfelagsskapir við nógvum virksemi fyri børn, ung & vaksin, sum umframt Várgleði og onnur tiltøk umfatar Sound of GloryTenSing, sum er kór, dans & drama. Sí meira á www.soundofglory.com

KFUM KFUK

**KFUM og KFUK**
Varðagøta 9
100 Tórshavn
tel 31 19 28

sozos



# Byggimálsviðgeri

Søkt verður eftir starvsfólki við tekniskari útbúgving til byggimálsviðgerð o.a. at byrja skjótast til ber. Talan er um eitt fulltíðarstarv á byggi- og býarskipanardeildini.

**Høvuðsuppgávur**
- Byggimálsviðgerð
- Byggieftirlit
- At fyrireika mál, ið skulu leggjast fyri byggi- og býarskipanardeildina og skipa fyri avgreiðslu av nevndar- og býráðssamtyktum
- Samskifta við borgarar, feløg og stovnar

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera útbúgvin tekniskt hjálparfólk, byggiteknikari ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Umsøkjarin skal duga væl føroyskt og helst hava kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad/MicroStation GeoOutlook.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja sær arbeiðið til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn oman fyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær Magna Dalsgaard, leiðara, ella Mikael Viderø, býararkitekt, tlf. 302010.

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. juni 2007. Merkið á umsóknina „Starv á byggi- og býarskipanardeildini".

Byggi- og býarskipanardeildin er partur av teknisku fyrisitingini. Á deildini starvast 20 fólk, harav 6 burturav við málsviðgerð av umsóknum um byggiloyvi v.m.

Árliga verða umleið 150 ymisk byggiloyvi givin.

Vit bjóða eitt áhugavert starv við búningsmøguleikum og góðum arbeiðsviðurskiftum.

Byggi- og býarskipanardeildin er í sama bygningi sum Snarskivan.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

# SANDOYAR MEGINSKÚLI

210 Sandur · Tlf. 361038 · fax 361866
t-postur: samesk@post.olivant.fo

## Varaskúlastjórastarv á Sandoyar Meginskúla

Vegna farloyvi verður starvið sum varaskúlastjóri á Sandoyar Meginskúla lýst leyst. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. august 2007 til 31. juli 2008.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum:**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsføðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans

**Harumframt skal varastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyristingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt í lønarflokki 32.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi 6.juni kl.1300

Nærri fæst at vita um starvið frá Elnu Skylv Hansen, skúlastjóra, á tlf 361038 & 211619.

**Sandoyar Meginskúli** hevur komandi skúlaár uml.120 næmingar í 5.-10.fl og um 14 lærarar.



# Mercedes til sølu

Ein sera væl hildin C200 CDI Diesel
Árg. 2004 - KM 121.000 Sum nýggjur
- Klima autm. - Fartpilot - EL setur
til sølu fyri kr. 295.000,-

# Tel. 582720